## Jákup um Paula

- Hann hevur altíð morgungron! Men annars er hann fittur og raskur. Hann búnast skjótt. Hann er einans 15 ár og hevur allar møguleikar at gerast sera góður svimjari. Hann er suverenur í sprintinum



## Pauli um Jákup

- Hann er besti beiggi tú kanst hava. Hann hevur góðan vilja. Hann er ein sosialur persónur, og hann er eitt kappingarmenniskja. Vit kappast ofta í FIFA fótbóltsspælinum



# Svimjibrøður stuðl

**Jákup og Pauli Mohr skulu til Oyggjaleikirnar. Teir vilja báðir koma heim aftur við heiðursmerki um hálsin. - Summi skilja ikki, at vit brúka so nógva tíð til svimjing. Tí er tað gott at hava Paula, sum er í somu støðu sum eg, sigur Jákup um beiggja sín**



Ítróttarprofilurin




**Heini S. Kristiansen**
heinik@sosialurin.fo


Brøðurnir Jákup og Pauli Mohr skulu báðir til Oyggjaleikirnar. Teir eru millum bestu svimjarar í landinum.

Jákup og Pauli eru synir hjá Øssuri og Ingvør Mohr úr Fuglafirði

Teir hava seinastu tíðina vant miðvíst móti Oyggjaleikunum, har ið báðir ætla sær heiðursmerki.

Undirritaði hittir brøðurnar Mohr í hugnaliga heimi teirra í Fuglafirði. Vit seta okkum at práta við køksborðið.

### Skaddur sum ungur

Jákup er 18 ár og Pauli er 15 ár. Jákup byrjaði at svimja sum ungur, men hann gjørdist skaddur sum 11 ára gamal og skuldi opererast. Hann byrjaði ikki aftur fyrr enn sum 13 ára gamal.

Pauli byrjaði longu sum 5 ára gamal at ganga til svimjing.

- Foreldrini hava altíð tikið okkum við til svimjing. Tey hava eggja okkum til at gerast svimjarar, sigur Pauli.

Brøðurnir báðir hava eisini fingist við annan ítrótt, men svimjingin hevur tó altíð verið nummar eitt.

- Fyri tveimum árum síðani byrjaðu vit at gerast ordiliga seriøsir við svimjingini, tí at tá sloppu vit at venja við fyrsta liði, siga Jákup og Pauli, sum svimja fyri FS.

Teir venja 7 ferðir um vikuna, og hvør venjing er 2,5 tíma. Vanliga venja teir tó enn oftari.

- Vit venja ikki so hart nú, tí at vit trampa niður til Oyggjaleikirnar. Kroppurin skal fáa møguleika at hvíla og byggja seg upp, sigur Jákup.

### Oyggjaleikir tað størsta

Jákup hevur arbeitt timburarbeiði seinastu mánaðirnar, men hann er givin til tess at fyrireika seg til Oyggjaleikirnar.

- Tað er sera strævið at svimja og arbeiða. Vit venja áðrenn og aftaná arbeiði, og arbeiðsdagurin er sum ein lang vektvenjing, tí at vit bera so nógv. Tað orkar tú ikki í longdini, sigur Jákup, sum heldur, at Oyggjaleikirnir eru størsta avbjóðingin hjá einum føroyskum svimjara.

- Eg var eisini á Oyggjaleikunum seinast, og eg haldi, at tað er tað størsta hjá einum føroyskum svimjara. Tað er sjálvandi eisini EM og HM, men tá hava teir føroysku svimjararnir ongan kjans. Á Oyggjaleikunum hava vit kjans til at vinna heiðursmerki, sigur Jákup.

- Hetta er fyrstu ferð, eg fari til Oyggjaleikirnar, og eg eri sera spentur, sigur Pauli.

Teir hava báðir sum mál at seta met og vinna í teirra grein.

- Eg ætli mær at seta met í bringusvimjing, og so burdi eg ligið til silvur ella gull. Annars er fyrsta málið at koma í finaluna, sigur Jákup.

- Eg ætli mær at seta met í 50 metrar frí, og so satsi eg uppá at fáa gullið, sigur Pauli, sum sostatt ætlar sær at betra um metið, sum Kristian Olsen nýliga hevur klárað.

### Stuðla hvør øðrum

Jákup og Pauli svimja ikki í somu kappingargrein. Teir eru ymiskir í bygnaði og hava ymiskar styrkir. Pauli, sum er yngri, er longri enn Jákup.

- Pauli er skjótari enn eg, tá ið tað kemur til teir styttru teinarnar, sigur Jákup.

- Men Jákup orkar betri enn eg. Hann orkar betri at svimja langt, er Pauli skjótur at svara.

Brøðurnir tosa nógv saman. Eisini um svimjing. Teir eru báðir glaðir fyri at hava hvønn annan, tá ið teir svimja.

- Tað er hart at fara upp klokkan 5 um morgunin, men tað er lættari, tá ið Pauli er við. Summi skilja ikki, at vit brúka so nógva tíð til svimjing. Tí er tað gott at hava Paula, sum er í somu støðu sum eg. Vit stuðla hvør øðrum væl og hyggja til kappingarnar. Øll familjan plagar at koma við, tá ið vit kappast. Hetta er ein verulig "svimji-familja", sigur Jákup